# Friðarligur mánadagur á Toftum

**Burtursæð at Rani Nolsøe við sigri á Olafi Berg kom á talvuna, so endaðu øll talvini í landsliðsbólkinum remis**

FM EINSTAKLINGAR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Ikki óvæntað er tað John Rødgaard, ið liggur á odda í kappingini um føroyameistaraheitið í talvi fyri einstaklingar*

*Savnsmynd*

Fjórða umfar í talvi fyri einstaklingar var á skránni mánadagin, og tað spældi friðarliga av. Í hvussu so er, tá ið tað ræður um úrslitini. Bara ein av teimum tíggju í landsliðsbólkinum tryggjaði sær eitt heilt stig. Tað var Rani Nolsøe. Eftir trý tey fyrstu umførini var hann tann einasti, sum bara hevði drigið svart. Ímóti Olafi Berg eydnaðist tað Rana við svarta fólkinum at fáa fulla úrtøku.

Øll hini fýra talvini endaðu jøvn. John Rødgaard hevur á fremsta plássinum trý stig, og Olaf Berg og Rani Nolsøe hava á aftastu plássinum hvør sítt stig. Tá ið hetta blaðið fór til prentingar, vóru fimm umfør eftir at telva. Harvið bar ikki til at siga annað, enn at alt framvegis var rættuliga opið. Mánadagurin var eyðkendur av, at allir framvegis mettu seg hava møguleika at vera við í kappingini, og at teir flestu mettu seg hava ráð til at tryggja sær eitt hálvt stig í staðin fyri at satsa fyri at vinna eitt heilt stig, er viðmerkingin frá telvarum, sum luttaka í landsliðsbólkinum.

Teir báðir ungu menninir, sum tvey tey seinastu árini hava vunnið FM, sótu mánadagin yvir av hvørjum øðrum. Hans Kristian Simonsen hevði hvíta fólkið ímóti Martini Poulsen, og tað var heilt skjótt, at teir vóru samdir um javnleik.

Carl Eli Nolsøe Samuelsen hevði hvíta fólkið ímóti Boga Ziska, og tað var eisini skjótt, at teir báðir vóru samdir um at býta stigið ímillum sín.

### Veteranarnir royndu leingi

Tvey tey síðstu talvini endaðu eisini við javnleiki. Steintór Rasmussen við hvíta fólkinum tóktist hava fyrimun ímóti Torkili Nielsen, og tað varð tosað um, at hann við kompliseraðum kombinatiónsspæli og møguligum frúgvaofri kundi havt vunnið. Men Steintór tóktist nýta eyka leik at fyrireika seg og harvið eisini at binda um, og so svann møguleikin burtur. Torkil bjóðaði javnt, og Steintór tók av.

John Rødgaard og Jens Kristian Hansen vóru eisini í drúgvum stríði, áðrenn teir gjørdu upp við seg sjálvar, at teir skuldu eiga eitt hálvt stig í part. Ikki minst hjá Jens Kristiani Hansen, sum tey seinnu árini hevur verið nógv á sjónum og tískil hevur telvað heilt lítið, varð hetta mett at vera gott úrslit. Millum teirra, sum fylgja við í FM kappingini í Tofta skúla, verður mett, at John Rødgaard í fýra teimum fyrstu umførunum hevur verið tann, ið hevur víst mest trygga og støðuga spælið.

Seinnapartin í gjár varð farið undir fimta umfarið. Tá ið telvararnir klokkan tvey sessaðust var John Rødgaard einsamallur á odda. Burturúr fýra teimum fyrstu umførunum hevði hann fingið trý stig. Aftanfyri hann sá soleiðis út: Hans Kristian Simonsen, Carl Eli Nolsøe Samuelsen, Bogi Ziska og Martin Poulsen høvdu 2,5 stig, Torkil Nielsen 2,0 stig, Jens Kristian Hansen og Steintór Rasmussen 1,5 stig og Olaf Berg og Rani Nolsøe 1 stig.

Í blaðnum í gjár varð sagt, at tað verður telvað hvønn dag fram til leygardagin, og at eitt umfar er á skránni hvønn dagin. Hetta var ikki heilt rætt. Langi fríggjadagur er frídagur, og Skírisdag eru tvey umfør á skránni.

Í fimta umfarinum vóru telvararnir í landsliðsbólkinum paraðir soleiðis: Torkil Nielsen-Hans Kristian Simonsen, Martin Poulsen-Jens Kristian Hansen, John Rødgaard-Carl Eli Nolsøe Samuelsen, Rani Nolsøe-Steintór Rasmussen og Bogi Ziska-Olaf Berg.

Í fyrsta bólki er Eyðálvur Johannesen úr Kollafjarðar Talvfelag greitt á odda. Hann hevur 3,5 stig. Honum næstir eru Finnbjørn Vang úr Klaksvíkar Talvfelag og Jákup á Rógvu Andreasen úr Vestmanna Talvfelag. Teir hava 2,5 stig.

Í unglingabólkinum eru Helgi Dam Ziska úr Havnar Telvingarfelag og Rógvi Egilstoft Nielsen úr Sandavágs Talvfelag á odda við 4,0 stigum, og teimum næstur er Rógvi Dragaberg úr Klaksvíkar Talvfelag við 3,5 stigi.

## Støðan í landsliðsbólkinum

| | | |
|---|---|---|
| 1 | IM John Rødgaard | 3,0 |
| 2 | Hans Kristian Simonsen | 2,5 |
| 2 | Martin Poulsen | 2,5 |
| 2 | Bogi Ziska | 2,5 |
| 2 | Carl Eli Nolsøe Samuelsen | 2,5 |
| 6 | Torkil Nielsen | 2,0 |
| 7 | Jens Kristian Hansen | 1,5 |
| 7 | Steintór Rasmussen | 1,5 |
| 9 | Rani Nolsøe | 1,0 |
| 9 | Olaf Berg | 1,0 |

# Nýggjar tíðir á Toftum

**Nýggju FIDE tíðirnar bera við sær, at møguleikarnir fyri styttri talvum eru størri samstundis sum tað ikki á sama hátt sum áður eru møguleikar at tapa upp á tíð**

FM FYRI EINSTAKLINGAR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Í FM kappingini, sum í hesi vikuni er á Toftum, verður telvað undir nýggjum tíðarkarmi. Talan er um broyttu ásetingarnar, sum altjóða talvsamtakið, FIDE, hevur samtykt. Broytingarnar eru gjørdar við tí fyri eyga, at niðurløgd talv ikki skulu koma upp í røkur, og ikki minst at talv og talvkappingar skulu verða meiri fjølmiðla vinarligar, siga teir, sum luttaka í FM kappingini í Tofta skúla.

Higartil hevur tað verið soleiðis, at telvararnir hava havt tveir tímar til fjøruti leikir, so ein tíma til tjúgu leikir og so ein hálvan tíma at gera talvið liðugt í. Tað vil við øðrum orðum siga, at møguleikar vóru fyri, at tað kundu fara upp til sjey tímar til eitt talv.

Nýggju ásetingarnar siga, at telvararnir hava hálvan annan tíma í part til alt talvið. Harafturat fáa teir ein hálvan minutt eyka fyri hvønn leikin, sum teir flyta. Um eitt talv er eitt nú seksti leikir, so verður samlaða tíðin fýra tímar. Tað kemur ikki ofta fyri, at tað í kappingum av tí slagnum, sum nú er á Toftum, fara so nógvir leikir til eitt talv.

Telvararnar, sum taka lut í landsliðsbólkinum hesa ferð, eru væl nøgdir við broytta tíðarkarmin. Serliga væl nøgdir eru teir við, at tað nú er møguleiki fyri at gera talvið liðugt, uttan at møguleikin fyri at tapa upp á tíð, sum tað verður nevnt, er so stórur, sum hann áður hevur verið.

Fyrsta ferðin at klokka yvirhøvur varð nýtt í talvkapping var í 1866. Tá vóru tað týskarin Adolph Andersson og eysturríkarin Wilhelm Steinitz, sum royndu seg. At tosa um serligar avmarkingar í hesi fyrstu royndini fyri næstan 140 árum síðani er í nútíðar høpi kanska burturvið. Teir høvdu til fyrstu fjøruti leikirnar fýra tímar í part! og so tveir tímar til næstu tjúgu leikirnar. Tá var møguleiki fyri fleiri ferðir at leggja talvið niður.

Síðani eru tíðaravmarkingarnar fleiri ferðir broyttar. Tíðin til hvørt talvið er vorðin alt styttri. Tað er ikki so langt síðani, at tað í FM kappingunum fyri einstaklingar var vanligt, at talvini vóru løgd niður. Nýggi tíðarkarmurin ber við sær, at hesin møguleikin nú so at siga ikki er til longur.



club KAGGIN
Mikukvøldið
Trio Dam
Ókeypis atgongd • double up kl. 21.00-22.00
Hósdag og fríggjadag
Stongt
Leygarkvøldið
Opið til kl. 04.00
Sunnudag
Stongt
Sunnudag
Opið til kl. 04.00
www.kaggin.fo
Sosialurin 341800

Broytingar
Broytingar á Suðuroyarleiðini
Mikudagin 7. apríl verður bjargingarstøðin sett umborð aftur á Smyril. Ferðaætlanin er tí broytt, og siglt verður soleiðis:
Kl. 07:00 av Drelnesi
Kl. 10:00 úr Tórshavn
Kl. 13:00 av Drelnesi
Kl. 21:00 úr Tórshavn
Mint verður eisini á, at broytingar eru í ferðaætlanini um páskirnar. Víst verður til ferðaætlanina og heimasíðuna www.ssl.fo
STRANDFARASKIP LANDSINS
www.ssl.fo · 34 30 30
REPROZ

WWW.SMYRIL-LINE.COM




Søkt verður eftir roknskaparfólki til NORRÖNU. Starvið umfatar kassa-, sølu- og lønarroknskap umborð. Viðkomandi skal hava banka- ella aðra roknskaparútbúgving og hava góðan teldukunnleika.
Umsókn við prógvum og upplýsingum um royndir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 21. apríl 2004 og skulu stílast til:
*Smyril Line*
*Manningarleiðarin*
*Postboks 370*
*110 Tórshavn*
J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo
REPROZ

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3752
Navn: P/F Rasmussen & Weihe. Adressa: á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 18.02.2004
Viðtøkudato: 18.02.2004
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 500.000,00 til kurs 100.
Stovnari: P/F 17. november 1979, 100 Tórshavn (P/F 267).
Nevnd: Ann-Mary á Rógvi Rasmussen, Undir Glaðsheyggi 6, 100 Tórshavn (formaður), Klaus Rasmussen, Undir Glaðsheyggi 6, 100 Tórshavn og Ole Johan Guldborg Nielsen, Turiðargøta 16, 100 Tórshavn.
Stjórn: Klaus Rasmussen, Undir Glaðsheyggi 6, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum ella av nevndarformanninum.
Grannskoðari: Sp/f Jóannes Skorheim, Heygavegur 62, 700 Klaksvík.
Roknskaparár: 01.02. - 31.01.
Fyrsta roknskaparár: 18.02.2004 - 31.12.2005
Endamál: Endamál felagsins er at reka grannskoðaravirksemi og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 5. apríl 2004

Kristin Balle







Leiðari
Barnagarðurin Sýslan og Frítíðarskúlin
søkir eftir leiðara við námsfrøðiligari útbúgving, at arbeiða 40 tímar um vikuna frá 1. mai 2004, lønarstig 22/28.
Barnagarðurin er normeraður til 36 børn við 3 stovum, 12 børnum og 2 vaksnum á hvørjari stovu.
Frítíðarskúlin er normeraður til 25 børn við einum deildarleiðara og 2 hjálparfólkum.
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.
Meira fæst at vita við at ringja til leiðaran, Súsannu á Stongum, tlf. 223423 ella 332948.
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi seinast 21. apríl 2004.
**Stýrið fyri barnagarðin Sýslan**
Sólvá Thomassen, formaður
FO-380 Sørvágur

Pedagogur
Barnagarðurin Sýslan søkir eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar um vikuna frá 1. mai 2004, lønarstig 10/16.
Barnagarðurin er ein sjálvsognarstovnur normeraður til 36 børn við 3 stovum, 12 børnum og 2 vaksnum á hvørjari stovu.
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.
Meira fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran ella varaleiðaran, tlf. 332948.
Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera okkum í hendi seinast 21. apríl 2004.
**Barnagarðurin Sýslan**
FO-380 Sørvágur

Royn okkara nýggja stoltleika - The place to dine ...
*Rio Grande Steak*
Steikin verður borðreidd heil og tit skera sjálvi fyri
Afturvið eru bakað epli ella báteepli, reyðvíns- ella bernaisesós, garniture og salat
RIO BRAVO RESTAURANT · Beef & Steak House ·
Fyri 2 pers. 290,-
Fyri 3 pers. 430,-
Fyri 4 pers. 565,-
Eta fleiri enn 4 pers. er kostnaðurin 125,- f. hvønn
Vit koyra eisini út ...
RIO BRAVO · TÓRSGØTA 11 · TÓRSHAVN · TEL 31 97 67

